alt um ítrótt

Mánadagur 9. september 1985 Nr. 32
Leysasøla kr. 5,- 1. árg.



*John Kramer, venjari hjá B68:*

# »I must be a hell of a man«

*John Kramer og B68 verða føroyameist-arar aftur í ár í fótbólti.*

síða 3

RVE

# Útihýstur av silvurliðnum í seinastu løtu



**Samrøða við John Kramer, venjari hjá B68**

1. partur

John Kramer hevur verið venjari hjá B68 í tvey kappingarár.

Ikki kann sigast annað enn at úrslitið av samstarvinum partanna millum hevur verið gott.

B68 hevur vunnið meistaraheitið í 1. deild bæði árini og 3. deildarliðið hjá felagnum hevur somuleiðis staðið seg væl.

Toftamenn eru sera væl nøgdir við Kramer.

Alt um Ítrótt hevur vent sær til John Kramer, ið eisini í Danmark er væl kendur sum venjari og fyrr sum leikari.

Alt um Ítrótt hevur biðið Kramer um at siga nakað frá lívssøgu síni og eisini nakað um hvat hann heldur um føroyskan fótbólt. Um viðurskifti og framtíð tess.

## Vinarligir og positivir

Sum sagt er Kramer væl kendur bæði sum venjari og leikari. Hetta innan bæði danskan og svenskan toppfótbólt. Hóast hetta er hann ikki nógv merktur av hesum.

John Kramer er ein ógvuliga vinsælur og fyrikomandi maður. Altíð klárur við einari viðmerking. Ofta skemtiligari, men kortini skilagóðari.

Kramer var eisini beinanvegin tilreiðar, tá Alt um Ítrótt bað um eitt prát.

Prátið vardi útvið 3 tímar eitt týskvøld uppi á Svangaskarði. Tað sum eyðkendi prát hansara var skynsemi og áræði. Og so tað at hann allatíðina tosaði positivt.

Torført er til fulnar at endurgeva alt tað, Kramer segði hetta kvøldið. Roynt verður tó eftir besta førimuni.

Av tí at prátið varð so drúgt, hava vit valt at býta frásøgnina upp í tvey.

Fyrsti partur í hesum blaðnum. Her mest um lívssøgu Kramers.

Seinni partur kemur í næsta blað. Tá um hvat Kramer heldur um fótbólt — eisini um føroyskan.

## Uppdrigin í Ringsted

John Kramer er f. 17.11.34. Hevur verið giftur í 28 ár við Birte og hava tey fýra børn. Kramer er útbúgvin ítróttainstruktørur fyri psyk. brekað. Hevur annars tikið skeið hjá D.B.U. og hjá svenska fótbóltssambandinum.

Ungdómsárini hjá Kramer vóru nógv merkt av ítrótti. Hann spældi fótbólt, borðtennis, dansaði, gjørdi fimleik o.s.fr.

Nógv vóru á yngri árum sum hann. Nevniliga Tordenskjoldsoldatar (t.v.s. at sama fólkið gongur aftur innan tær nógvu ymsu ítróttargreinirnar).

Kramer metir, at tað er gott fyri tað unga ítróttafólkið at kombinera fleiri ítróttagreinir. T.d. nevnir hann, at ein fótbóltsleikari hevur gott av at íðka fimleik og dans. Hann gerst meira fimur av hesum.

Tó er neyðugt at prioritera um 17-18 ára aldurin, um ein ynskir at koma í hæddina í einihvørjari ítróttagrein.

Sum 18 ára gamal legði Kramer alt annað enn fótbólt meira og minni á hillina.

Kramer hevði ambitiónir um at gerast ein so góður fótbóltsleikari sum gjørligt. Og hann vildi leika saman við teimum bestu.

## Fór til Køge

Hesar ambitiónir vóru tó torførar at realisera í Ringsted.

Fer so í 1953 at leika við Køge Boldklub. Hann kemur á 1. deildarliðið beinanvegin og upplivir ta stóru gleði, at Køge gerst meistari í kappingarárinum 1953/54.

Tó fór Danmarksturneringin nevniliga fram í tveimum. Hon byrjaði við tí góða veðrinum, og endaði við tí góða veðrinum. T.v.s. at byrjað var í juli/aug. Støðgur á hávetri og endaði so aftur í juni/juli.

Hetta var fyrstu ferð at felag uttanfyri Keypmannahavn vann DM.

Kramer var í Køge til 1957.

## Á veg til Statirnar endaði í Svøríki

Kramer kom í samband við fótbólt í USA í 1957. Ætlanin var eisini at hann skuldi fara haryvir.

So fekk hann tilboð um at verða leikandi venjari hjá 2. deildarliðnum Sundsvall í Svøríki.

Tað var ikki loyvt útlendingum at leika í 1. deild í Allsvenskan um tað mundið.

Tó var lætt at gerast svenskur statsborgari, og fleiri 1. deildarlið lógu framvið.

Endin var tó, at Kramer fór aftur til Danmarkar í 1959. Hann fór til B 1901.

Í samráð við familjuna avgjørdi hann at fara út í provinsin. Annars var KB eisini inni í myndini longu tá.

## Útihýstur frá Silvurliðnum

B1901 kom uppí 1. deild. Kramer á landsliðið. Debuteraði í Parkini móti Finnlandi. Vunnu 4-0. Harald Nielsen, 3, Kramer 1.

Liðið var gott. Enoksen, Flemming og Harald Nielsen, Poul Pedersen, From Bent Hansen o.a. Venjarin var Arne Sørensen.

Teir vóru m.a. á Balkan.

Landsliðsævintýrið hjá Kramer fekk tó ein bráðan enda.

Felagsvenjingin til OL 1960 var byrjað, og menn vóru ógvuliga spentir. Liðið var jú frálíka gott.

Uttan aðra ávaring fær Kramer eitt bræv frá D.B.U. Sagt varð frá, at hann tíverri ikki kundi luttaka í landsliðsvenjingini til OL longur. Honum varð ikki loyvt at luttaka í OL. Orsøkin var, at hann hevði fingið pening fyri at leika í Svøríki.

So strangt var tað tá.

## Aftur til Svøríkis

Kramer var hjá B1901 í 7 ár. Síðan fór hann aftur til Svøríkis. Hann fór til IF Heimer í Lidkjøbing.

Var har í 2 ár og fekk teir uppí 2. deild.

Síðan setti Wennersborg IF seg í samband við Kramer.

Umframt at venja fekk hann tilboð um at taka eina 3 ára útbúgving sum instruktørur í ítrótti fyri brekað. Hetta á Kellshagen sjúkhúsi.

## Til Frem

Kramer fer aftur til Danmarkar í 1971 og tekur við venjarastarvi hjá Boldklubben Frem.

Var har í 3 ár. Fyrsta árið fingu teir bronsu.

Síðan fer Kramer til Slagelse í 1974. Hann loysti Edwin Hansen av.

Kramer var í Slagelse í 7 ár. Tað gekk samanlagt bara væl. Eitt sindur upp og niður.

Kramer kemur til KB í 1980. Árið fyri hevði KB oytt eitt meistaraheiti burtur uppá eina fatala heysthálvu. So í 1980 skuldi tað bara verða. Og væl gekk í hond hjá Kramer. Teir vunnu DM í 80.

81 nr. 4-5 og í 82 gekk enn verri.

Kramer hevði mist sera nógv fólk og aftaná fyrru helvt lá liðið til niðurrykkjan. Seinna helvt byrjaði sum fyrra endaði.

Endin varð, at Ole Sørensen tók yvir. Men heldur ikki hann megnaði at gera nakað.

Kramer hevði kontakt við KB fyri 1983. Men Ole Sørensen var jú har nú, so menn samdust um at fara hvør til sítt. Og hvør fekk sítt.

Um árskiftið 82/83 var Kramer fyrstu ferð í samband við Niclas Davidsen hjá B68. Tað bar tó ikki til hjá Kramer at taka av tilboðnum frá B68 tá, tí hann hevði bundið seg til Fårevejle.

Kramer er so hjá Fårevejle kappingarárið 1983. Fårevejle er lítil bygd á Sælandi og leika teir í seriuni.

Kramer treivst væl har. Tá hann ikki vandi, hjálpti hann til við ymiskum fyrifallandi arbeiði í eini ítróttarhøll á staðnum.

Kramer skrivar eisini sáttmála við Fårevejle fyri 1984.

Nú kemur Niclas Davidsen aftur uppí leikin. Hann gevur Kramer eitt sera gott tilboð. Kramer tosar við leiðsluna hjá Fårevejle. Teir eru large.

So kom Kramer til Føroya á vári 1984.

FH

# Aldri færri enn 22 til venjingar

*Í fyrra parti av samrøðuni við John Kramer, ið stóð í seinasta blað, fingu vit nakað av lívssøgu Kramers.*

*Annars partur snýr seg meira um, hvat Kramer hevur at siga um føroyskan fótbólt og møguleikar tess.*



## Verið í Føroyum áður

Tá Kramer kom til Føroya í mars 1984 at venja B68, var tað ikki fyrstu ferð, hann kom til Føroya.

Kramer hevði nevniliga verið her við einum úrvalsliði hjá SBU í 1952. Aftaná eina drúgva ferð við Tjaldrinum og næstan hálvdeyður í sjóverki, kom hesin fitti og kleini unglingi til Klaksvíkar, har hann sum hinir varð privat inkvarteraður.

Kramer búði hjá bakaranum í Klaksvík, (sum hann nú hevur gloymt navnið hjá), og har búði hann væl. Hann var sum ein sonur í húsinum.

Tá so B68 og KÍ hittast í fyrsta landskappingardystinum á vári 1984 á Toftum, kemur ein klaksvíksdama at hitta Kramer á máli. Tað er dóttur fyrrnevnda bakara. Hon segði Krameri frá, at mamma hennara hevði glett seg ómetaliga nógv til at síggja hann aftur, men at mamman tíverri var deyð fyri bert 14 døgum síðan.

Dótturin segði fyri Kramer, at mamman aldri hevði gloymt hann aftur, og at hon hevði roynt at fylgja honum síðan hann hevði verið í Føroyum.

Kramer hevur síðan vitjað hesa somu dóttur í Klaksvík.

Vit lata nú Kramer fáa orðið aftur. Hesaferð tosar hann sum sagt um fótbólt.

## Hvirvelvind-fodbold

Kramer sigur, at meginreglan í fótbóltinum hjá honum er tann, at leikarin alla tíðina skal gera tað hann kann. T.v.s. gera so nógv til nyttu sum gjørligt.

Til tess er neyðugt við eini tipp topp kondition.

Kramer hevur heldur einki ímóti, at tað er ferð yvir fótbóltinum. »Jeg har altid holdt meget af hvirvelvindsfodbold«, sigur John Kramer.

Hann sigur eisini, sum púra rætt er, at skalt tú fáa ein leikara til optimalt at vísa sínar teknisku og fysisku kynstir, so er neyðugt at leikarin er sera væl fyri.

## Fylgt sínum princippum

Sigast má eisini, at Kramer ivaleyst hevur fylgt sínum pricippum fult út, tá hann hevur vant B68. Toftamenn hava hesi bæði árini verið sera væl fyri, tá hugsað verður um treysti og styrki. Stríðshugur teirra hevur somuleiðis verið framúr. Teir hava leikt við slíkari ferð, at mótstøðumenn hava mest sum bert sæð í nakkan á teimum.

## »Færinger mindet for at træne«

Kramer sigur, at tað ikki tók honum langa tíð at síggja, at toftamenn trongdu til eina harða hond.

Teir skuldu læra, at tað skuldi kosta nakað at vera millum teir bestu. Teir skuldu læra diciplin (sjálvdiciplin).



Læra at halda tíðina og at gera sum sagt verður.

Tað er ikki nokk bert at hava eitt viðføtt talent.

Hetta gjørdist tó ikki ein so trupul uppgáva, sum ein skuldi trúð.

Tað sæst beinanvegin, at toftamenn høvdu stak góðan hug til at venja eisini hart. Møttu væl og stundisliga.

Kramer sigur, at hann hesi bæði árini ongantíð hevur havt færri enn 22 mans til venjingar.

Kramer sigur eisini, at hansara royndir vísa, at føroyingurin er »mindet« fyri at venja. Tað ger einki um venjingin verður stýrd.

## Leikarin skal trúgva uppá ein

Sjálvsagt er ikki nokk bert at renna og hoppa. Ein venjari má eisin koma á bylgjulongd við leikaran psykist, fyri at fáa hann til at gera tað, ið biðið verður um.

»Deri ligger en grummestor opgave for træneren«, sigur Kramer.

Tað er av týdningi, at tú fært leikararnar til at trúgva uppá teg, tá tú tosar fótbólt við teir.

Tað er eisini um at gera at raka tankagongdina hjá teimum.

## Hittast heima hjá leikarum undan dysti

Leikarar, leiðarar og venjarar hittast altíð $2^{1}/2$ tíma undan hvørjum dysti í heiminum hjá einumhvørjum leikara til ein léttan døgurðabita.

Verður leikt í t.d. Havnini, ja so hittast teir hjá einihvørjari toftafamilju, ið býr í Havn.

Bæði leikarar og venjari leggja stóran dent á týdningin av hesum »alternativu taktikfundum«.

## Eingin framtíð uttan fortíð

Leikháttur in hjá B68 er ikki meinlíkur vanligum donskum leikhátti, har ofta mesti denturin verður lagdur á tað tekniska.

Vit hava spurt Kramer um, hví hann ikki hevur roynt at geva B68 eitt meira danskt snið leikliga sæð.

Til tess sigur Kramer, at tað ikki er heilt rætt, at tað altíð er teknikkurin, ið sermerkir danskan fótbólt.

Annars tykist tað honum ikki so løgið, at leikháttur og mentalitetur okkara líkist tí bretska. Søgan sigur jú, at føroyingurin er ættaður frá írum ella bretum.

»Annars meti eg tað ikki sum uppgávu mína at broyta leikararnar. Heldur er uppgávan tann at fáa leikararnar til at gera tað, teir kunnu so ofta og so gott sum gjørligt.

## Venja 3 ferðir um vikuna

Frá tí at fyrireikingarnar til kappingarárið byrja, og til enda av sama, venja toftamenn 3 ferðir um vikuna.

Vit loyvdu okkum at spyrja Kramer um hvussu vant verður, og venja teir sum sæst niðanfyri:

**Mánadag: Sera hart við spæli við bólti og renning.**

**Mikudag: Tað sama.**

**Hósdag: Innandura styrkis- og skjótleikavenjing og aftaná smáspøl við bólti (hetta eisini meðan kappingin gongur).**

## Amatørar hava eisini tíð

Vit spyrja Kramer um, hvat hann heldur um føroyskan fótbólt. Og hvat ið kann gerast, fyri at hesin møguliga kann gerast betur.

Kramer heldur, at føroyskur fótbóltur, sum er, neyvan er kappingarførur. Í hvussu so er ikki við stóru grannar okkara.

Men um føroyskur fótbóltur kann gerast tað, er onnur søga.

Kvaliteturin er til staðar. Bert mugu leikarar og leiðarar gera sær greitt, at nógv størri arbeiði má leggjast í, um føroyskur fótbóltur skal megna at bíta frá sær.

Sjálvt um leikararnir bert eru amatørar, so kunnu teir væl venja 3-4 ferðir um vikuna. Og ikki bert ein part av árinum.

## F.S.F. leggja betur tilrættis

»F.S.F. skal eisini skipa arbeiði sítt á heilt annan hátt,« sigur Kramer.

Burtursæð frá at F.S.F. skal syrgja fyri, at góðir venjarar og dómarar verða útbúnir, so má F.S.F. eisini leggja alt landsliðsarbeiði nógv, nógv betur tilrættis.

Kramer sigur, at hann ikki dugir at síggja, hví tey ymisku fótbóltslandsliðini ikki skulu hava felagsvenjingar 1-2 ferðir um vikuna um veturin.

## FIFA

Kramer sigur, at hann hevur frætt, at vit ætla okkum uppí FIFA.

Um tað skal verða veruleiki, ja so má og skal F.S.F. av álvara til verka. Og tað sama mugu tey einstøku feløgini.

Tá verður neyðugt at alt landsliðsarbeiði, bæði hvat viðvíkur eldri sum yngri liðum má koma í eina fasta legu, har arbeitt verður miðvíst.

Ivaleyst verður neyðugt við kunstgrasvøllum, um vit skulu gera okkum vónir um at fótbóltsstøðið skal hækka.

John Kramer sigur, at hann loyvir sær at ivast nakað um, hvussu leingi fótbóltur verður »nationalsport« hjá okkum, um ikki verður arbeitt miðvíst í framtíðini. Aðrar ítróttagreinir standa tilreiðar at koma sær framat.

Annars er rætt, at F.S.F. fer uppí altjóða fótbóltssamstarv (FIFA, OL). Bert vit fyrireika okkum rætt.

## Eisini konan trívist

Kramer sigur, at hann verður venjari hjá B68 aftur næsta ár. Hann hevur hug at verða í Føroyum, ið hvussu so er eina tíð enn.

Kona hansara, ið eisini býr á Toftum og arbeiðir á Nyki, trívist sra væl millum toftafólk.

Kramer sigur, at hann ikki hevur fingið tilboð frá øðrum felag enn B68.

Kramer og familjan eru tó ikki á Toftum alt árið.

Tá kappingin er av og til jan/febr. árið eftir búgva tey í Fårevejle.

Kramer heldur sjálvur, at hann neyvan hevur havt tað betur enn nú. Hann og familjan sjálvsagt.

Um veturin í Fårevejle um várið, summarið og heystið á Toftum.

Um dagin er konan á Nyki og hann á »landsholdinum«. Um kvøldið, meðan konan er í bindiklubba ella á vitjan hjá arbeiðsfeløgum, so hugni eg mær á vøllinum saman við ágrýtnu toftadreingjunum.

FH

## Kemur Ole Skouboe aftur til Føroya?

Í hesum døgum verður nógv tosað um fótbóltsvenjarar til komandi ár. Einstøk feløg hava longu sett venjara, og onnur lýsa í bløðunum eftir venjara.

Havnar Bóltfelag hevði leikarafund í síðstu viku, men frá teimum fáa vit onki at vita enn.

Leysatíðindi ganga, at Ole Skouboe hevur hug at koma aftur til Føroya. Ole Skouboe var í Føroyum fyri tveimum árum síðani og var ógvuliga væl dámdur sum venjari. Hann fekk eitt tilboð frá Aris Soloniki í Grikkalandi, har hann skuldi leika við 1. deildarliðnum.

Um leysatíðindini eru sonn, fáa vit at vita seinni.

VM



## Johan Nielsen skal venja B36

B36 hevur nú avgjørt, at Johan Nielsen skal halda fram at venja 1. deildarbólkin í felagnum.

Tað eru trý ár síðani, at Johan Nielsen kom í B36. Í fjør fór B36 í 2. deild og í ár vann B36 2. deildina og tryggjaði sær aftur pláss í 1. deild.

Umframt Johan Nielsen, hevur B36 eisini avgjørt, at Jógvan Norðbúð skal taka sær av 4. deildarliðnum og unglingaliðnum. Jógvan Norðbúð leikti á 2. deildarliðnum hjá B36 seinastu dystirnar í landskappingini.

VM